25 ára starvsdagur:

## Dámar líka væl enn

STARVSDAGUR
*Solby A. Eliasen*

– Mær dámar líka væl at arbeiða her nú, sum tá eg byrjaði, sigur Frígerð Jacobsen, sum hevur arbeitt á Posthúsinum í Klaksvík í 25 ár.

– Um ein hugsar um tað, so hava starvsfólkini í Postverk Føroya yvirhøvur verið í sama starvi í langa tíð, vísir Frígerð á.

Frígerð sigur, at á skrivstovuni á Posthúsinum í Klaksvík er bert ein kona, sum hevur verið styttri enn hon. Og tann konan hevur verið har í fimtan ár.

– So her má vera okkurt gott, okkurt sum dregur, ha?

– Eg byrjaði blaðung, 19 ára gomul á skrivstovuni, hevði júst átt eitt barn. Eg bleiv sera væl móttikin, greiðir Frígerð frá.

Hon sigur, at tá var alt øðrvísi, tí at tá vóru ongar teldur, so alt varð skrivað við hond. Men so komu teldurnar og øll hin tøknin eisini, og brádliga gekk alt so nógv skjótari.

– Men tað var kortini líka spennandi at arbeiða, hóast alt, sigur Frígerð.

Hon sigur at, at tey onkuntíð plaga at práta um gamlar tíðir, hvussu hugnaligt tað var at arbeiða tá.

– Ikki tí, tað er framvegis hugnaligt at arbeiða her, tað er bara øðrvísi.

Spurd um, hví hon ikki hevur roynt okkurt annað og møguliga farið onkra aðrastaðni, svarar Frígerð:

– Klaksvíkingar eru ikki so grammir at fara aðrastaðni – í øllum førum eru nógvir, sum verða verandi her alt sítt lív, uttan at royna aðrar leiðir. Tey, sum fara, koma sjálvdan aftur. Her er so smátt at koma aftur, um tú hevur verið úti í stóru verð, sigur Frígerð, sum sjálv bert hevur verið burtur frá starvi sínum í eitt hálvt ár vegna barnsburð, øll 25 árini, hon hevur starvast á Posthúsinum í Klaksvík.



*– Eg byrjaði blaðung, 19 ára gomul á skrivstovuni, hevði júst átt eitt barn. Eg bleiv sera væl móttikin, greiðir Frígerð frá*

Gísli Gíslason í Klaksvík:

# Undirsjóvartunnil positivt árin á Norðoyggjar

**- Eg pástandi ikki, at Norðoyartunniln fer at hava somu positivu ávirkan eins og Hvalfjarðartunnilin, men roknast kann við, at okkurt líknandi kann henda í Føroyum, segði Gísli Gíslason, sum almennum fundi í Klaksvík hóskvøldið**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík, Sosialurin:** Fýra ár eru liðin, síðani undirsjóvartunnilin undir Hvalfirðinum varð tikin í nýtslu, og í samband við, at farast skal undir ein undirsjóvartunnil í Norðoyggjum, hevði Vinnulívsráðið saman við Handilsfelagnum í Klaksvík boðið Gísla hendan vegin.

Gísli skuldi greiða frá høvuðssjónarmiðum í tunnilsætlanini undir Hvalfirðinum, lýsa tær áskoðanir, settar vóru fram og meta um avleiðingarnar, sum tunnilin hevur havt fyri bygdarmenningina norðan fyri Hvalfjørð.

Eini 110 fólk møttu upp til fundin, og hetta er heilt nógv, tá hugsað verður um, hvussu nógv fólk vanliga møta til almennar fundir og fyrilestrar í Klaksvík.

### Vitjað Klaksvík fyrr

Gísli Gíslason er borgarstjóri á Akranesi í Íslandi og hevur eisini vitjað í Klaksvík fyrr. Fyrru ferð helt hann ein fyrilestur um søguna aftan fyri undirsjóartunnilin undir Hvalfirðinum, sum tá var í gerð. Hetta var ein drúgv søga við nógvum klandri millum tey, sum høvdu álit á hesi uppgávu, og tey ivingarsomu, sum vóru ímóti henni.

Hildið varð uppá, at stór líkindi vóru fyri, at kostnaðurin fór at gerast ov mikil, og at fíggjargrundarlagið sostatt var óálítandi. Eisini varð sagt, at tunnilin bert fór at súgva fólk og tænastur inn á høvuðsøkið í Reykjavík.

Men tunnilsgerðin gekk væl, og 4 ár eru nú liðin, síðan tunnilin varð tikin í nýtslu.

Gísli greiddi frá, at ferðslan ígjøgnum tunnilin er økt ár undan ári, og ávirkanin av tunnilinum er nógv størri, enn væntað varð.

### Hugburður broyttur

Gísli segði eisini, at undirsjóvartunnilin undir Hvalfirðinum hevur havt ómetaliga stóra ávirkan fyri Akranes, samstundis sum hann greiddi frá teim framburðsmøguleikunum, ið tunnilin hevði verið við-virkandi til.

Eitt nú er hugburðurin hjá íbúgvunum á Akranesi broyttur munandi av hesum ferðsluábøtum. Fyrr vóru ávísir tættir sum handilsvirksemi, virksemi hjá arbeiðstakarum og ymsar tænastur vard av fjarstøðini til høvuðsstaðin Reykjavík. Tann støðan hevði bæði fyrimunir og vansar. Eftir at tunnilin varð latin upp, hava partar av hesum greinum noyðst at stríðst ímóti kapping frá høvuðsstaðnum, samstundis sum hetta marknaðarøkið hevur latið upp fyri nýggjum møguleikum.

– Fyri at møta kappingini og kunna nýta møguleikarnar hevur roynst á dirvið hjá akurnesingum, og yvirhøvur kann sigast, at teir hava klárað seg stak væl, og hetta hevur aftur ført til betri tænastu og økt arbeiði, segði Gísli Gíslason.

### Heldur fyrimunur

– Eg pástandi ikki, at Norðoyartunniln fer at hava somu ávirkan eins og Hvalfjarðartunnilin, men roknast kann við, at okkurt líknandi kann henda í Føroyum, segði Gísli.

– Vit mugu minnast til, at meginøkið i Íslandi er nógv størri enn føroyska meginøkið. Hinvegin kann sigast, at hóast Klaksvík og Akranes líkjast nógv, so er Klaksvíkin lutfalsliga sterkari øki enn Akranes mótvegis høvuðsstaðnum. Ikki er lætt at gita, hvørja ávirkan hesi ymsu lutføllini hava, men roknast kann við, at Klaksvík hevur fittar møguleikar at fáa størri fyrimunir, heldur enn vansar, burtur úr betri samferðslu, segði borgarstjórin á Akranesi at enda.




*Eyðfinn Reyðberg handar Gísla Gíslasoni gávu frá Norðyoya Sparikassa eftir fyrilesturin hóskvøldið*



# Klaksvíkingar ávaraðu móti politinum

**Klaksvíkingar hildu saman, tá ferðslupolitiið úr Havn hósdagin var norðuri í Klaksvík og gjørdu ferðslumátingar.**

FERÐSLA
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík, Sosialurin:** Longu hálvan tíma eftir, at ferðslupolitistarnir vóru komnir til Klaksvíkar, frættist í býnum, at ferðamátingar vórðu gjørdar í Norðoyggjum.

Onkur skemtiligur norðingur hevði hongt eitt stórt skilti upp í býnum, har skriva stóð: "Løgreglan tekur ferðamátingar í Norðoyggjum í dag !"



*Frá Politistøðini í Havn frætta vit, at hóast klaksvíkingar royndu sum frægast at ávara móti ferðslumátingunum, so vórru fleiri bøtur givnar*

### Ávarðu dúgliga

Hetta skiltið var skríggjandi grønt, og sást av tí sama langan veg. Um 10-tíðina mikumorgunin hekk tað norðan fyri Statoilstøðina mitt í býnum, men seinni um dagin hevði onkur hongt tað uttanfyri býin á óbygdum øki.

Ein kelda sigur, at longu um 9-tíðina varð ringt út til tey flestu arbeiðsplássini í býnum og ávarað ímóti ferðamátingunum, og hvør fartelefon bippaði óført við sms-boðum, sum søgdu frá, hvar í býnum, kanningar vóru gjørdar.

### Tóku fleiri

Frá Politistøðini í Havn frætta vit, at hóast klaksvíkingar royndu sum frægast at ávara móti ferðslumátingunum, so vórru fleiri bøtur givnar.

Hetta vóru mest bøtur fyri ólógligar vinstra-parkeringar, men onkur varð eisini tikin fyri at koyra ov skjótt.

Úr býnum verður sagt, at annar hvør bilur á høvuðsvegnum fekk eina parkeringsbót, so hóast væl varð boðað frá, so gekk ikki klaksvíkingunum heilt eftir vild hendan dagin.

# Lærlingar vitja oljuvinnuna í Aberdeen

**Komandi mánadag fara 14 lærlingar frá Tekniska Skúlanum í Klaksvík til Aberdeen at kunna seg um el- og maskinarbeiði í frálandavinnuni.**

ÚTBÚGVING
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík, Sosialurin:** Tekniski Skúlin í Klaksvík er saman við 3 øðrum føroyskum skúlum limur í Oljuútbúgvingarsamtikinum. Føroysku skúlarnir hava nú í eitt ár samstarva við Aberdeem College, og senda teir nú 14 lærlingar til Aberdeens í eina viku.

### Vitja borupall

Ætlanin er, at lærlingarnir skulu fáa nakað av praktiskari frálæru á Aberdeen College, og harafturat skulu teir eisini vitja ein borupall í fullari stødd.

Hesin boripallur er tó ikki ein veruligur boripallur, men ein simulator, ið stendur á landi.

Simulatorin inniheldur øll tey amboð, ið vanliga verða nýtt á einum boripalli, og sleppa lærlingarnir at royna øll hesi amboð.

Annfinn Heðinsson er ein av teimum 14, sum skulu avstað, og hann gleðir seg.

- Eg fekk boðini fyri einum 3 vikum síðani, og eri fegin um, at eg fái hendan møguleika, sigur hann.

- Vit eru allir líka spentir, og væntandi verður hetta ein lærurík ferð. Vit sleppa at royna nøkur ting, sum ikki eru gjørlig í Føroyum, so hetta er avgjørt spennandi fyri okkum, sigur Annfinn.

### Ikki fyrstu ferð

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Tekniski Skúlin í Klaksvík sendir næmingar avstað til Aberdeen. Í novembur mánaði sendi skúlin 20 SIT-næmingar avstað á eina líknandi ferð.

Tey skrivaðu eina frágreiðing um túrin, eftir at tey komu heimaftur, og í hesi frágreiðing sæst, at tey fingu nógv burtur úr túrinum.

Ætlanin er, at lærlingarnir, sum nú fara avstað, eisini skulu skriva eina frágreiðing um túrin hjá teimum. Á hendan hátt fáa allir næmingarnir á skúlanum møguleikan fyri at fáa meir at vita um el- og maskinarbeiði í frálandavinnuni.




*Næmingarnir, ið fara avstað eru: Tummas Joensen, sP/F Einar Mortensen, Jan Venned, Klaksvíkar Sleipistøð, Annfinn Heðinsson, Pomek, Àrni Skorðastein, KJ-Hydraulik og Jákup Samson, Klaksvíkar Sleipistøð. Hans Arne Bertholdsen, lærari á Maskindeildini, verður eisini við.*